




# Tutl tutlar íslendskt


*Íslendska fløgan »Lemon River«, sum Tutl hevur útgivið*

FLØGUÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Plátufelagið Tutl hevur júst givið út fløguna »Lemon River« hjá íslendska bólkinum Klakki. Hetta er fløga nummar tvey í røðini, sum Klakki gevur út á Tutl. Klakki gav í 1999 út »Í kjól úr vatni«, sum hevur fingið góða umrøðu, bæði í Íslandi og aðrastaðni.

Sangarinnan í Klakki, Nína Björk Elíason, er íslendsk, men býr í Danmark.

Hin høvuðspersónurin í Klakki, gittarleikarin Hasse Poulsen, er dani, men spælir mest ymsastaðni runt í Evropa. Hasse er búsitandi í París.

Orðini í sangunum á fløguni byggja á gamlar kinesiskar yrkingar. Hóast hvørki sangarin ella gittarleikarin eru frá Onglandi verða sangirnir sungnir á enskum, tó við einum ávísum íslendskum orðalagi. Stílurin er meira rokkkendur á hesi útgávuni enn á »Í kjól úr vatni«.

Klakki hevur enn einaferð biðið Tutl geva út, tí forlagið hevur gott orð á sær innan fólka- og heimstónleik. Harafturat hevur Tutl gleði av at útgeva so væl í oyrað fallandi tónleik.

Í løtuni verður roynt at breiða fløguna út í handlum í Eysturríki og Týsklandi saman við øðrum heimstónleiki frá Tutl.

Fløgan »Lemon River« hjá Klakki kostar 159 krónur.

## Kirkjufundur í Gøtu

KIRKJUFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnudagin 25. november hittast kirkjuráðslimir, kirkjutænarar og prestar í Eysturoynni á felags kirkjufundi í Gøtu.

Kirkjufundurin byrjar við almennari guðstænastu við altargongd í Gøtu kirkju klokkan 17.00. Eftir guðstænastuna verður fundur í Gøtu kirkju fyri kirkjuráðslimum og kirkjutænarum, har Meinhard Bjartalíð, sóknarprestur á Glyvrum, hugleiðir um evnið: »Sangur og tónleikur í guðstænastuni.«

Aftaná fundin verður borðhald í kirkjukjallaranum, har eisini høvi verður hjá luttakarunum at skifta orð um kirkjumál.

Hetta er ikki fyrsta ferðin ein tílíkur fundur er á skránni. Í fjør varð eisini skipað fyri líknandi fundi á Glyvrum.

Ætlanin við slíkum fundum er at umrøða kirkjumál, og harvið styrkja og menna samstarið millum tey, sum hava eina tænastu í kirkjuni.

Eysturoyggin telur fimm prestagjøld, fimm prestar, 14 kirkjur, 2 bønhús, umframt fýra onnur guðstænastustøð.

Kirkjuráð er til hvørja kirkju, og minsta tal á kirkjuráðslimum er seks, umframt sóknarprestin, sum er fastur limur í kirkjuráðnum í prestagjaldinum.

Havnar Sjónleikarafelag:

# Ísbjarnirnar frumframsýndar

SJÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Nú nærkast dagurin, tá Havnar Sjónleikarafelag fer at hava sína fyrstu sýning av leikinum »Ísbjarnirnar« eftir svianum Jonas Gardell.

Jonas Gardell er 38 ára gamal, sjónleikari, undirhaldari og rithøvundur. Hann hevur skrivað bøkur og leikrit, og hevur hann eisini skrivað til sjónvarp, operu og film, og er Jonas ein av teimum best umtóktu norðurlendsku »stand-up comedians«.

38 ára gamli sviin hevur eina sjáldsama góða gávu at seta hol á okkara gerandisdag, og harvið lýsa kenslurnar aftanfyri. Í hansara skrivihátti er onki »tabu«. Hann flytir seg snildisliga millum stórt og smátt, millum dreym og harðan veruleika. Millum annað var hansara fyrsta bók, Passionsspelet, um samkyndan kærleika. Henda bók gav Gardell sera góð ummæli sum rithøvundur.

Tekstir hansara eru umsettir til norkst, danskt, týskt, spanskt, estlendskt, russiskt og nú eisini føroyskt.

Egi Dam hevur leikstjórnað sjónleikin »Ísbjarnirnar«, og týtt hevur Jytte Joensen. Leikarar eru Gunnvá Zachariasen, Eyð Matras, Nora Bærentsen, Ronni Poulsen og Jytte Joensen. Havnar Sjónleikarafelag stendur fyri leikuppsetanini.

Fyrsta sýningin verður sunnudagin 25.11.2001 klokkan 19.00, og ikki 24.11.2001, sum áður kunngjørt. Hetta kemst av, at Norðurlandi hevur eina finska leiksýning sama dag, og tí hevur Havnar Sjónleikarafelag avgjørt at útseta frumsýningina ein dag.

Smiðjan í Lítlu Vík:

## Kári Svensson sýnir fram


*Kári Svensson fer í næstum at sýna fram málningar í Smiðjuni í Lítlu Vík*

LIST
*Ingrid Bjarnastein*

Fernisering við málningum hjá Kára Svensson verður í Smiðjuni í Lítlu Vík fríggjadagin 23. november klokkan 16-20.

Annars er framsýningin opin leygardagin 24. november frá klokkan 15-18 og sunnudagin 25. november frá klokkan 15-20

# Eiragarður fingið útslúsingardeild

LANDSJÚKRAHÚSIÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Í ár vóru 500.000 krónur játtaðar til Landsjúkrahúsið um, at gera eina íløgu til eina útslúsingardeild. Hetta umfatar í fyrsta umfari ein sjúkling, sum hevur tørv á røkt alt samdøgrið.

Deildin er nú latin upp, og fyrsti sjúklingurin er fluttur inn á deildina saman við røktarfólkunum. Í hesum sambandi var lítil móttøka á deildini fríggjadagin 16. november.


